Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðul til brúkara í Tórshavn

Stuðulstænastan søkir eftir einum hjálparara skjótast gjørligt at arbeiða 30 tímar um vikuna hjá einum rørslutarnaðum manni í Tórshavn.

Hjálparin fer at arbeiða saman við øðrum hjálparum, ið arbeiða 8 tíma vaktir – dag- kvøld- og náttarvaktir í eini 24 tíma vaktarskipan.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava eina viðkomandi sosiala- ella heilsufakliga útbúgving hava fyrimun til starvið. Neyðugt er at hava koyrikort.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagnum.

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Nærverkið, tænastustaðið í løtuni er Stuðulstænastan. Løn sambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Karin á Heygum, sosialráðgeva, tlf: 354020.

**Umsókn:**
Umsókn saman við avrit av prógvum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Løkjatún 1, F0-160 Argir

**Umsóknarfreist: 8. oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Leiðari til Sambýlið í Smærugøtu í Tórshavn

Søkt verður eftir leiðara til Sambýlið í Smærugøtu 29 til setan 01.12.2007.

Sambýlið í Smærugøtu 29 er heim hjá 4 fólkum við menningartarni. Endamálið við sambýlinum er at skapa eitt trygt og mennandi heim og umhvørvi fyri hvørt búfólk.

Ynskiligt er, at tann, sum settur verður, hevur kunnleika til og royndir innan arbeiði við fólki, sum eru menningartarnað. Eisini er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur roynt seg sum leiðari áður og hevur framhaldsútbúgving innan økið.

**Vit sóknast eftir einum fólki, sum:**
- hevur lokið námsfrøðiligt ella líknandi prógv
- hevur hug og hegni at fyrisita og leiða
- kann standa fyri at fremja broytingar
- hevur vilja og evni at samstarva við viðskiftafólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur hugflog at síggja møguleikar fram um forðingar
- kann seta greiðar linjur

**Setanartreytir:**
Setanarøki er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni í Trivnaðartænastuni.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsókn**
Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðara, á telefon 304020.

Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmæli og lívsgongdarlýsing skulu sendast til:

**Nærverkið**
Trivnaðartænastan
Stílað: Jóanes N. Dalsgaard
Eirargarður 2,2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 8. oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




1. november 2007 verða hølini til daghald fyri pensiónistar í Nólsoy klár at taka í nýtslu.

Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki at fyrireika og skipa fyri virkseminum. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Talan er um parttíðarstarv. Tímatalið verður ásett í mun til játtan frá Almannastovuni sambært løgtingslóg um stuðul til umsorgararbeiði.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, tlf. 302010.

Umsókn við upplýsing um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. oktober 2007.

Tórshavnar kommuna

P/f Oyspan
310 800 210 800

**Søkt verður eftir fólki við royndum innan húsabygging**

**Talan er um fast starv við góðari løn til rætta persónin**

**Frættið nærri við at ringja á tel. 210800**